# MASKINMEISTARIN

Nr. 11 / Mai 2020



# Mykja verður til streym og hita



Korona skal ikki forða lønarhækking



Sjóhitaskipanin í Klaksvík



20 ára starvsdagur

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
4 útgávur eru um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda MASKIN-MEISTARAN, kunnu boða frá hesum í teldupost til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið; t.e fyri 4 bløð

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
*Biogassanlegg*
Øssur Winthereig
*Sjóhitaskipan*
Grækaris D. Magnussen
*Sjúrður Heinesen*
Ingolf S. Olsen

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting, prent og liðugtgerð**
Estra 478500

Upplag: 800

# INNIHALD

**Sáttmálasamráðingar:**

Korona skal ikki forða lønarhækking .......... 4
Sjóhitaskipanin í Klaksvík .......... 7
Mykja verður til streym og hita .......... 12
Sjúrður 20 ár í Maskinmeistarafelagnum .......... 19
Fakfelagsrørslan stendur í stað .......... 22
11 maskinmeistarar fingu prógv .......... 25
Føðingardagar .......... 26
Tíðindi frá Maskinmeistarafelagnum .......... 27










# Fíggjarmálaráðharrin vendur í hurðini

Tíðliga í ár var hol sett á samráðingarnar ímillum Maskinmeistarafelagið og almennu arbeiðsgevararnar um sáttmálarnar, sum gingu út 1. oktober í fjør. Krøvini vóru handað, og fundir vóru avtalaðir – tann fyrsti við KAF hevði eisini verið.

Okkara krøv umfataðu ein samansettan pakka, har ymiskir lutir vóru við, millum annað ein lønarhækking, sum verðuliga ger mun.

Mótpartarnir høvdu sjálvandi eisini síni krøv, og teirra karmur bygdi á júst gjørda sáttmálan ímillum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Í stuttum var innihaldið í honum 795 krónur ella 595 krónur fyrra árið, alt eftir um inntøkan er omanfyri ella niðanfyri 30.000 krónur um mánaðin, og so 2,25 prosent seinna árið.

Men so kom hendan ólukku sóttin, og allar sáttmálasamráðingarnar blivu parkeraðar í óásetta tíð.

Tann støðan stóð við til 6. mai, tá vit brádliga blivu kallað á fund á Hotel Hafnia av sjálvurm Jørgeni Niclasen, fíggjarmálaráðharra.

Eg gjørdi mær beinavegin mínar hugsanir um, hvat hann mundi fara at borðreiða við, og tað fekst sjón fyri søgn, tá ið vit saman við umboðum fyri umleið 15 onnur fakfeløg møttu á fundinum.

Boðini vóru greið, hann vildi hava fakfeløgini at vísa samfelagssinni við at góðtaka nakað, sum líktist einari null-loysn. Tó so segði hann seg kunna strekkja seg til eina hækking í krónum, har útgangsstøðið var 0,8 prosent lønarhækking fyri eina løn uppá 30.000 krónur um mánaðin fyrra árið og so eitt trillrunt 0 tað seinna árið. Fíggjarmálaráðharrin legði upp til, at alt bleiv gjørt í einari kollektivari semju við øll feløgini.

Tað er synd at siga, at boðini vórðu móttikin við standandi lógvabrestum.

Vit vóru fleiri, sum nýttu høvið til at vísa á órímiligheitina í útspælinum, serliga sæð í ljósunum av, at tvey feløg júst høvdu undirskrivað góðar tvey ára sáttmálar – annað av teimum enntá eftir at samfelagið var latið aftur – umframt tey feløg, sum seinast gjørdu trý ára sáttmálar, sum góvu lutfalsliga nógv tað seinasta árið.

Men nú skuldu vit, sum høvdu staðið so fitt í bíðirøð, standa eftir við ongum.

Fíggjamálaráðharrin segði seg skilja frustratiónina, men at hann einki fekk gjørt við tað, sum longu var undirskrivað.

Fundurin bleiv tó stuttur, og svarið frá øllum teimum møttu feløgunum var kortanei.

Øll feløgini vildu hava sínar egnu samráðingar við støði í egnum krøvum.

Fyri okkum er støðan púra greið. Korona broytir onki, tá tað ræður um sáttmálasamráðingarnar. Vit ætla okkum avgjørt at taka samráðingarnar uppaftur, har tær steðgaðu, og fara undir ongum umstøðum at góðtaka nakað, sum er minni enn tað, sum hini hava fingið.

Ólavur Gunnarsson
*– formaður í Maskinmeistarafelagnum*

***Aðalfundur og blaðið***

***Aðalfundurin, sum skuldi vera í mars, men mátti útsetast, verður leygardagin 23. mai.***
***Blaðútgávan er eisini vorðin ávirkað av farsóttini, so hetta blaðið er tað fyrsta í ár. Afturfyri verður eftir ætlan tætt ímillum bløðini restina av árinum, og í næsta blaði verður millum annað sagt frá aðalfundinum.***

*Ólavur Gunnarsson:*

# Korona skal ikki forða lønarhækking

**Tað nyttar onki hjá hvørki Fíggjarmálaráðnum ella privatu arbeiðsgevarunum at brúka koronasmittuna sum jarnbrot at fáa Maskinmeistarafelagið at slaka í sínum krøvum. Tað leggur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum dent á. Samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag eru byrjaðar aftur, men formaðurin fýlist á, at tað gongur ov seint at fáa gongd á aftur samráðingarnar við almennu arbeiðsgevararnar**



*– Vit fara undir samráðingarnar á neyvt sama grundarlagi, sum var galdandi áðrenn koronakreppuna. Tað merkir millum annað, at vit halda fast um, at vit nú skulu undir at skarva av stóra lønareftirsleipinum, sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum*

**TEKSTUR OG MYND:** INGOLF S. OLSEN – PRESS

– Koronafarsóttin ávirkar at kalla alt í samfelagnum og sjálvandi eisini arbeiðsmarknaðin. Men tað eru kortini ikki viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum, sum eru orsøk til nakra kreppu, og inntriv í sáttmálarnar kunnu heldur ikki upp á nakran máta loysa hesa kreppuna. Tí koma arbeiðsgevarar heldur ongan veg við at koma við krøvum um lønarafturhald grundað á koronakreppuna.

Tað sigur Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, avgjørdur. Útsøgnin kemur í kjalarvørrinum av, at fíggjarmálaráðharrin hevur lagt eitt ávíst trýst á Starvsmannafelagið um at frásiga sær lønarhækkingina, sum tað felagið fekk til høldar í sáttmálanum við Fíggjarmálaráðið, ið varð undirskrivaður 30. januar.

## Rínir ikki við

Jørgen Niclasen, fíggjarmálaráðharri, hevur grundað sína umbøn á, at koronafarsóttin hevur blakað landið út í eina djúpa búskaparkreppu.

Men slík argument fara ikki at rína við Maskinmeistarafelagið, ið stendur á gáttini at samráðast um allar sínar føroysku sáttmálar – bæði við almennu arbeiðsgevararnar og teir privatu.

– Nei, vit fara undir samráðingarnar á neyvt sama grundarlagi, sum var galdandi áðrenn koronakreppuna. Tað merkir millum annað, at vit halda fast um, at vit nú skulu undir at skarva av stóra lønareftirsleipinum, ið serliga føroysku maskinmeistararnir á landi hava samanborið við lønirnar hjá teirra starvsfeløgum í londunum, sum vit plaga at samanbera okkum við, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Formaðurin ótolnast

Samráðingarnar við KAF, Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, vóru so smátt byrjaðar, áðrenn partarnir 16. mars samdust um at steðga vegna koronafarsóttina. KAF-sáttmálin er tann størsti sáttmálin fyri maskinmeistarar á landi og umfatar millum annað SEV og IRF.

Krøvini vóru handað tíðliga í mars, og partarnir høvdu avtalað ein røð av dagfestum fundum og høvdu havt ein teirra, áðrenn trýst var á pausuknøttin.

Nú ótolnast formaðurin í Maskinmeistarafelagnum eftir at sleppa aftur til samráðingarborðið.

– Um hálvan apríl fingu vit at vita frá KAF, at tað manglaði lítið í at fáa teirra sáttmála við Starvsmannafelagið upp á pláss, og at vit skuldu sleppa framat beinanvegin aftaná. Tað hevur drigið út, og eg giti, at tað ikki minst er orsakað av royndunum hjá fíggjarmálaráðharranum at rógva aftur á aftur í mun til sáttmálan, sum hann sjálvur skrivaði undir við Starvsmannafelagið í januar.

– Men hetta gongur ov seint, tí summarið nærkast, og vit hava sagt, at vit skulu vera liðug áðrenn summarferiuna. Vit hava jú fleiri aðrar sáttmálar at samráðast um eisini, sigur Ólavur Gunnarsson.

## Spilt krút

Umframt sáttmálan við KAF, skal

*Framhald á næstu síðu >>*



Maskinmeistarafelagið eisini samráðast um nýggjar sáttmálar við Fíggjarmálaráðið, FAG (Føroya Arbeiðsgevarafelag) og Føroya Reiðarafelag. Sáttmálarnir við KAF og Fíggjarmálaráðið gingu út 1. oktober í fjør, tann við Føroya Reiðarafelag gekk út 1. apríl í ár, og tann við FAG gongur út 1. juni.

Samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag eru so smátt byrjaðar. Sáttmálin, sum gekk út 1. apríl, var gjørdur í fjør vár og bar brá av at vera ein neyðsáttmáli. Hann snúið seg nevniliga næstan bara um, í hvønn mun manningarnar skuldu taka lut í gjaldinum fyri kvotur keyptar á uppboðssølu.

– Fokus var á uppsjóvarskipini, meðan fleiri aðrir veiðibólkar duttu niður ímillum. Tí leggja vit í samráðingunum hesaferð dent á at fara aftur eftir teimum meira vanligu krøvunum um betri sømdir fyri allar veiðibólkar. Onkur skeiklað viðurskifti skulu eisini fáast upp á pláss, millum annað skal tað ikki vera munur á hýruviðurskiftunum, sama um fiskað verður av eginkvotu ella felagskvotu, sigur Ólavur Gunnarsson.

Hann staðfestir, at nógva orkan, sum í fjør var brúkt upp á at fáa eina avtalu um uppboðssølukvoturnar, var burturspilt krút. Tí uppboðssølan er burtur í nýggju fiskivinnulóggávuni, sum nýggja samgongan er komin við eftir løgtingsvalið, sum var 31. august.

– Tess størri týdning hevur tað nú at fáa eina góða avtalu, sum fevnir nógv breiðari um allan flotan, sigur formaðurin í Maskinmeistarafelagnum.

### Tørvur á betringum

Síðani eru tað sáttmálarnir við Fíggjarmálaráðið og FAG. Ólavur Gunnarsson sigur, at hann hevur skrivað til Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um at fara undir tær samráðingarnar, men hann hevði ikki fingið nakað svar, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Sáttmálin við FAG er í gildi enn, men Ólavur Gunnarsson sigur, at tey hava verið í sambandi við mótpartin. Flestu limirnir, sum eru umfataðir av tí sáttmálanum, starvast á fiska- og alivirkjum.

– Har er tørvur á betringum. Maskinmeistararnir hava hampuliga góða fortjenastu á teimum arbeiðsplássunum, men tað er ikki lætt hjá okkum at fylgja við, hvussu nógv teir í veruleikanum arbeiða. Í verandi sáttmála er endalønin umleið 35.000 krónur. Tað er ikki nøktandi, og tí miða við millum annað eftir at fáa fleiri lønarstig inn í sáttmálan, sigur hann.

### Vanligar umstøður

Ólavur Gunnarsson er avgjørdur um, at koronakreppan ikki skal ávirka sáttmálasamráðingarnar. Tí kreppan er ikki ein arbeiðsmarknaðarkreppa. Men hann heldur heldur ikki, at sáttmálarnir eiga at leggja upp fyri slíkum óvæntaðum hendingum, har tað kann vera neyðugt at gera bráfeingis inntriv á arbeiðsmarknaðinum – eins og tað til dømis bleiv gjørt við ALS-hjálparpakkanum.

– Um vit skulu gera sáttmálar, sum eru baseraðir upp á øll møgulig sløg av undantaksstøðum, so verður onki fantilsi á. Serstøður eru jú sum oftast sera ymiskar. Tí má ein sáttmáli sum meginregla vera grundaður á vanligar umstøður. Tað ber ikki til at leggja upp fyri øllum, og eg haldi heldur ikki, at tað er rætt at royna tað, sigur hann.

### Slopnir snikkaleysir

Higartil kann formaðurin í Maskinmeistarafelagnum fegnast um, at hansara limir eru slopnir nøkulunda snikkaleysir frá koronafarsóttini, tá tað ræður um at varðveita arbeiðið.

– Eg havi ikki hoyrt um, at nakar skal hava mist starvið vegna koronafarsóttina. Tað ávirkar tó gerandisdagin í ólukkumát hjá fleiri av okkara limum. Millum annað merkja teir í frálandavinnuni væl og virðiliga avleiðingarnar, tí útmynstringarnar verða nógv longri enn ætlað. Tað ávirkar so eisini teir, sum eru heima og kunnu síggja fram til eina langa útmynstring uttan tó at vita við vissu, nær teir skulu avstað.

– Kanska fara teir, sum hava verið heima, ímeðan farsóttin hevur verið í hæddini, at merkja tað uppaftur meira negativt, tá teir nú fara avstað aftur. Tí nú skulu teir út í langar útmynstringar, meðan viðurskiftini annars verða normaliserað, sigur Ólavur Gunnarsson.

Hann sigur, at koronasmittan eisini hevur merkt gerandisdagin nógv hjá maskinmeistarum, sum hava ábyrgdina av skipanum, ið eru av stórum samfelagsligum týdningi.

– Eitt nú hava maskinmeistarar hjá SEV verið at kalla avbyrgdir frá umheiminum og samveru við onnur fólk alla hesa tíðina, tí teir hava ábyrgdina av, at streimveitingin virkar, sigur Ólavur Gunnarsson.





*Jóhan við Neyst uttanfyri Sjóhitastøðina. Aftanfyri síggja vit runda betongbrunnin. Rørleiðing liggur einar 400 metrar út í fjørðin og inn í brunnin, og haðani verður sjógvurin pumpaður úr brunninum inn í sjálva sjóhitaskipanina. Gjøgnum svarta rørið, fammanfyri Jóhan, rennur sjógvurin útaftur á sjógv*

# Sjóhitaskipanin í Klaksvík vekir ans uttanlands

**3. oktober í 2019 var eitt stórt frambrot í grønari føroyskari søgu veruleiki. Tá var nýggja sjóhitaskipanin hjá Klaksvíkar Kommunu alment tikin í nýtslu. Skipanin hevur riggað væl, og hon vekir ans – ikki bara í Føroyum, men eisini uttanlands**

**TEKSTUR OG MYNDIR:** GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN – PRESS

Eg hitti leiðaran á Sjóhitastøðini uttanfyri sjálva støðina í Klaksvík hendan dagin. Heilt inni í víkini, tætt við Biskupstorg. Her inni, á syðra armi, liggur hon, umrødd langt út um landoddarnar.

Hann er blíður, søgufróður og ikki sørt errin av Sjóhitastøðini, Jóhan við Neyst, tí hann er tað, sum hevur ábyrgdina av, at sjóhitaskipanin riggar sum hon skal. Og tað ger hon.

– Hon hevur riggað óalmindiliga væl, tað má eg siga, heldur Jóhan við Neyst fyri.

Brúkararnir higartil eru íbúgvarnir í Biskupstorgi, har eru 30 íbúðir. Seinni er ætlanin, at handlar og onnur skulu kunna leiga seg inn í niðaru hæddina, og tá verða hesi eisini bundin í skipanina. Haraftrat eru BankNordik og

*Framhald á næstu síðu >>*



*Gulu pumpurnar pumpa sjógv inn í skipanina*

Skúlin við Skúlatrøð í dag bundin í sjóhitaskipanina. Skoytibreytin varð eisini tikin uppí, tá hon varð tikin í nýtslu í fjør.

– Har er tað soleiðis, at køling-in, sum fer fram har, ger, at vit fáa hita frá kompressaranum, sum so fer inn í eina glykolskipan, og vit fáa so eitt sindur av hita av tí. Tað hevur riggað væl, sigur Jóhan við Neyst.

## Rørleiðing út í fjørðin

Ein umleið 400 metrar long rør-leiðing er løgd út í fjørðin, og haðani kemur sjógvur so inn í ein brunn, sum liggur beint uttanfyri Sjóhitastøðina.

Inni á støðini eru pumpur, sum pumpa sjógvin inn. Roknast kann altíð við einum sindri av skitti í sjónum, og tí eru góð filtur sett upp í skipanini inni á støðini, sum sálda allan skitt frá. Skipanin er so neyv, at tá ein sonevndur differensur ella broyting merkist í filtrunum, fara tey sjálv í gongd, og tey reinsa seg sjálv.

**”Vit hava lagt merki til, at rørini, sum vit hava lagt langt niðan í býin, gerast so heit, tá sólin sær á tey, at onkuntíð hava vit bara sløkt fyri Sjóhitastøð-ini“**

Jóhan við Neyst, deildarleiðari

– Á tann hátt halda vit alla tíð-ina sjógvin reinan. Og hitin í sjó-num er rættiliga støðugur, hann liggur millum sjey og ellivu hita-stig alt árið. Og so hava vit lagt merki til, at rørini, sum vit hava lagt langt niðan í býin, gerast so heit, tá sólin sær á tey, at onkun-tíð hava bara vit sløkt fyri Sjó-hitastøðini. Rørini liggja beint undir asfaltinum, og tá sólin rakar asfaltið, verður tað so heitt, at eisini rørini, og tað sum er í rør-unum verður heitt. Ta einu ferðina sløktu vit sjóhitastøðina í einar tríggjar-fýra vikur. So tað er rætti-liga snilt, at vit eisini kunnu fáa hita á tann hátt, heldur Jóhan við Neyst.

**”Higartil hevur sjó-hitaskipanin riggað óalmindiliga væl, tað má eg siga“**

Jóhan við Neyst

## Ongir trupulleikar

Ofta verður tosað um byrjanar-trupulleikar, tá nýggjar skipanir av ymsum slag verða settar í verk, men her hava ongir byrjanartrup-ulleikar verið.

– Vit hava sjálvandi fylgt ógvu-liga væl við alla tíðina, og møgu-leikarnir at fylgja væl við eru so góðir í dag. Alt er inni á teldu, og ein rúgva av følarum eru alla-staðni í skipanini, og teir siga frá, um tað bara er tað allarminsta, sum hendir. Tí kunnu vit vera á staðnum beinanvegin, og er eitt ella annað, sum skal umvælast ella rættast, so verður tað gjørt beinanvegin – tað verður gjørt so hvørt, sigur Jóhan við Neyst.

## Orkan kann tvífaldast

Sum er hevur Sjóhitastøðin tveir hitavekslarar, sum eru 1,7 mega-watt hvør, so tað ber væl til at víðkað orkuna til brúkararnar í kommununi til tað tvífalda.

– Tá tað verður fult útbygt, megnar sjóhitaskipanin ivaleyst at røkka til 80 prosent av allari



Klaksvíkini, heldur Jóhan við Neyst.

Hann vísir á, at áhugin fyri sjó-hitaskipanini er stórur. Úr Dan-mark er ein journalistur komin til Føroya burturav fyri at hyggja at og skriva um Sjóhitastøðina í Klaksvík. Og fleiri vitjanir eru frá-boðaðar úr útlondum seinni í ár.

## Fingu hugskotið í 2015

Klaksvíkar kommuna skuldi eftir boðum úr landsstýrinum í holt við at útbyggja eina spillvatnsskipan. Talan var um eitt stórt arbeiði, og stórur partur av býnum skuldi gravast upp, og har skuldu leggj-ast kloakkrør og annað.

Jógvan Skorheim, borgarstjóri, sigur, at tað var tá, at hugskotið um eina sjóhitaskipan kom. Í 2015 var ætlanin endaliga sam-tykt í býráðnum.

– Hetta byrjaði sum ein lítil tanki, og í dag kunnu vit forsýna ein stóran part av Klaksvíkini, sigur Jógvan Skorheim, borgar-stjóri.

Brot úr røðuni hjá Jógvani Skorheim, tá Sjóhitastøðin varð tikin alment í nýtslu:

*„Nógv verður tosað um um-hvørvið, men ofta verður ov lítið framt.*

*Hetta er ein stórur dagur! Ein stórur dagur fyri okkum, ið bú-leikast her, og ein stórur dagur fyri umhvørvið. Hetta er slóðbrót-andi á fleiri økjum.*

*Sjóhitaskipanin, sum í dag al-ment verður tikin í nýtslu, er ein heilt nýggj og framfýsin loysn, sum í hesi støddini ongantíð áður er roynd í Føroyum.*

*Tí vil eg fyrst og fremst takka býráðnum, kommununi og tykk-um arbeiðstakarum, sum hava gjørt hetta møguligt.*

*Vit kunnu øll vera errin av úrslit-inum, og eg eri errin av, at vit saman hava raðfest hetta. Íløgan fer at hava týðandi leiklut fyri umhvørvið, brúkaran, kommun-una og okkara komandi ættarlið.*

*Í dag taka vit eitt stig á leiðini.*

*Verkætlanin hevur verið drúgv, men tá ið farið verður undir nýggjar verkætlanir, ið eisini krevja nýhugsan, so veit ein og hvør íverksetari, at vegurin til mál-ið er ikki eftir einari beinari linju.*

*Endamálið við skipanini hevur frá byrjan verið, at farast skal til verka soleiðis, at skipanin í fram-tíðini kann útbyggjast enn meira.*

*Hetta merkir, at tað longu nú er gjørt klárt til, at komandi værkætl-anir verða knýttar at skipanini.*

*Harafturat hevur kommunan longu bygt ein bygning uppi á ítróttarøkinum, sum skal brúkast sum liður í víðari útbyggingum, tí innan alt ov leingi, skulu eisini ítróttarhallirnar og svimjihøllin knýtast í sjóhitan.*

*Somuleiðis er gjørt klárt til, at aðrir vinnuaktørar og almennir bygningar í býnum kunnu knýta seg til skipanina, tá teirra íløga er gjørd klár,*“ segði Jógvan Skor-heim, borgarstjóri millum annað, tá sjóhitaskipanin varð tikin al-ment í nýtslu.

Vit eru aftur staddir uttanfyri Sjóhitastøðina, deildarleiðarin, Jóhan við Neyst, sum er útbúgvin maskinmeistari, og undirritaði. Jóhan við Neyst vísir á, at longu nú eru fleiri lutfalsliga stórir brúk-arar bundnir í nýggju sjóhitaskip-anina hjá kommununi. Men størsti brúkarin fer ivaleyst at vera svimjihøllin í Klaksvík.

– Eg veit ikki, nær hon verður

*Framhald á næstu síðu >>*



*Hetta eru heilt serligu filtrini – við gráu stemplunum í endanum, sum filtrera sjógvin, so hann er reinur, tá hann kemur inn í skipanina*



*Jóhan við Neyst inni í Sjóhitastøðini. Høgrumegin síggja við gulu pumpurnar, sum pumpa sjógv inn í skipanina, og uppi yvir honum síggja vit tað eina bláa filtrið, sum reinsar sjógvin*

bundin í, men vit vóna, at tað verður skjótt. Nýggja bústaðarbyggingin uppi yvir Fossum fer eisini at fáa sjóhita. Vit fara at leggja rør niðan, so eisini tey kunnu verða bundin í skipanina, sigur Jóhan við Neyst.

## Serlig vekslaraskipan

Teir báðir stóru vekslararnir, sum eru 1,7 megavatt hvør, hava ein avgerandi leiklut í sjóhitaverkinum. Inni í vekslarunum er ein sjósíða og ein glykolsíða ella ein brine-skipan. Glykolið er feskt vatn blandað saman við frostløgi (kølaraløgi).

– Sjógvurin fer inn í vekslararnar og so út aftur á sjógv. Á vegnum verður hitin tikin úr sjónum og koyrdur inn í brine-skipanina (glykolið), og verður so pumpað niðan í býin. Hitapumpurnar pumpa hitan til brúkararnar úr hesi brine-skipanini, greiðir Jóhan við Neyst frá.

Her inni á Sjóhitastøðini eru eina rúgva av rørum og tólum. Allar pumpurnar eru av slagnum, DESMI, hetta er, sambært maskinmeistaranum Jóhan við Neyst serliga gott og kent slag av pumpum. Eina aðrastaðni síggja vit ein flow-mátara, og hann vísir til dømis, at skipanin í løtuni nýtir 34 kubikk um tíman. Har eru allir knøttarnir til pumpurnar, og eina aðrastani – á vegginum – hongur elektronikk-skápið, sum stýrir øllum elektronikkinum, eisini teldunum.

Sjálvur heldur hann hetta vera eitt sera spennandi arbeiði hjá sær sum maskinmeistara. Og serliga hugaligt er tað, tí skipanin hevur riggað so væl higartil.

– Og so vóna vit sjálvandi, at tað fer at loysa seg fíggjarliga eisini. Men enn hava vit so fáar brúkarar á skipanini, sigur hann.

Teir eru tveir mans, sum arbeiða við skipanini, og sum hava eftirlit við henni. Men óneyðugt er at vera nakað serligt inni á sjálvari Sjóhitastøðini, tí á skrivstovuni hjá Jóhan við Neyst sæst alt á teldum, sum gongur fyri seg á Sjóhitastøðini, og nógv sæst eisini á fartelefonini.

Vit hava flutt okkum úr Sjóhitastøðini, og eru nú á veg niður í kjallaran í Biskupstorgi. Komnir niður í kjallaran og eftir at hava gingið eina løtu gjøgnum smalar gongir, snara vit til vinstru og koma inn í eitt kjallarúm við nógvari tøkni. Her stendur útgerðin, sum tekur ímóti frá Sjóhitastøðini. Her standa millum annað fýra hitapumpur, sum syrgja fyri at hita allar tær 30 íbúðirnar í bygninginum.



*Sjóhitastøðin er ein snøggur bygningur við nógvum stórum vindeygum út móti sjónum – og móti Biskupstorginum*

> ” **Sjógvurin fer inn í vekslararnar og so út aftur á sjógv. Á vegnum verður hitin tikin úr sjónum og koyrdur inn í brine-skipanina (glykolið), og verður síðan pumpað niðan í býin** “
>
> Jóhan við Neyst

Soleiðis verða teir bygningar, sum fáa hita frá sjóhitaskipanini, útgjørdir fyri at alt skal spæla saman. Og deildarleiðarin og maskinmeistarin sær fram til, at uppaftur fleiri verða bundin í grønu og framkomnu Sjóhitastøðina hjá Klaksvíkar kommunu.

Aðrastaðni í Føroyum eru tey eisini farin til sjóhita – á Boðanesheiminum í Havn nýta tey í dag sjóhita, og í Leirvík eru eisini ætlanir at gera eina sjóhitaskipan, sum líkist sjóhitaskipanini í Klaksvík.





SJÓVINNUSTÝRIÐ

HVØRJUM KUNNU VIT HJÁLPA TÆR VIÐ?

SIGLINGARLOYVI
SKAÐAFRÁGREIÐINGAR
SKIPASÝN
FAS
SJÓVINNUBRØV
UNDANTAKSLOYVI
MANNINGARÁSETING
MYNSTRING
SIGLINGARBØKUR
SKIPASKRÁSETING
LOÐSPRÓGV
24/7 VAKTTELEFON

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

www.fma.fo / fma@fma.fo / tel 35 56 00

MYKJA VERÐUR TIL STREYM OG HITA

# Mykja verður til streym og hita

**Biogassverkið Førka er um at vera liðugt, og bíða verður eftir, at bakteriurnar fara at gera sítt arbeiði í teimum báðu stóru tangunum á verkinum. Verkið skal taka ímóti tøðum ella mykju frá bøndunum og allari súrløgu frá alivinnuni. Í súrløguni er sjálvdeyður laksur. Biogassið skal dríva ein gassmotor upp á 1500 kilowatt**

TEKSTUR OG MYNDIR: ØSSUR WINTHEREIG – PRESS



*Biosgassverkið Førka stendur innast inni á vegnum á Sandvíkahjalla*

Aftanfyri ein av betongbygningunum á nýggja biogass-verkinum á Sandvíkarhjalla stendur ein spildurnýggjur tangabilur, har Førka stendur á tanganum.

Bilurin skal koyra út til bøndurnar og fylla tangan við tøðum ella mykju. Fleiri bøndur eru í gongd ella hava fingið sær stórar køstar, har Førka-bilurin pumpar tøðini í tangan. Hesin bilurin tekur 38 kubikk av tøðum.

Bilurin koyrir inn í móttøkuhøllina á verkinum, sum liggur innast inni á vegnum á Hjalla. Slangan verður sett niður í eina trakt, sum gongur niður í ein brunn undir gólvinum. Tangin við tøðum verður tømdur niður í tangan eftir trimum minuttum.

Slangan verður nú flutt ein metur niður í eitt annað rør, og reinskað tøð verða pumpað upp í tangan – tað tekur fimm minuttir - og Førka-bilurin koyrir útaftur til bøndurnar við reinskaðum tøðum.

Hetta skal bilurin gera so at siga hvønn gerandisdag, tá verkið er farið í gongd.

Umframt Førka-bilin, sum koyrir eftir tøðum og útaftur til bøndurnar við tøðum, koma aðrir bilar við sonevndum súrløgi, ið er av sjálvdeyðum laksi frá alibrúkunum. Súrløgurin verður pumpaður í ein annan tanga í fyrsta lagi.



*Fróði Mortensen, rakstrarleiðari, í móttøkuhøllini, har bilarnir koma við tøðum og taka ímóti avgassaðum tøðum at koyra útaftur til bøndurnar*




*Verkið hevur egnan tangabil, sum skal koyra mykju frá bøndunum til verkið hvørja viku*

## Tøðini fara rundferð

Fróði Mortensen er rakstrarleiðari á nýggja biogassverkinum Førka, sum Bakkafrost eigur og letur byggja. Fróði Mortensen er maskinmeistari og hevur í fleiri ár arbeitt við at seta upp biogassverk í Danmark og øðrum londum.

– Ja, nú siti eg so hesumegin borðið, men eg havi nógvar royndir frá slíkum verkum, so hetta er avbjóðandi, sigur Fróði Mortensen.

Vit eru fyrst í apríl mánað, og verkið er nakað seinkað, men Fróði vónar, at um mánaðarskiftið apríl-mai verður verkið sett í gongd.

Førka-bilurin koyrir inn á betonggólvið í móttøkuhøllini, og tøðini fara nú sína rundferð á biogassverkinum Førka. Á vegnum verður súrløgurin blandaður uppí, og alt verður pumpað upp í teir stóru tangarnar – tann størri er 9000 kubikk og tann minni 3000 kubikk. Í tangunum fáa tøðini frið, og úr sevjuni kemur gass – tøðini verða avgassað.

Í sevjuni fer ein gering í gongd, sum frígevur biogass – mest er tað metangass og $CO^2$, men eisini onnur gasssløg hanga uppií. Gassið drívur ein gassmotor, sum er 1500 kilowatt. Motorurin skal framleiða streym til SEV, og kølivatnið skal latast Hitafelagnum.

Til samanberingar eru vindmyllurnar í Neshaganum 900 kilowatt hvør.

Tá tøðini hava gjørt sína gassskyldu, verða tey pumpað yvir aftur í móttøkuhøllina í ein annan brunn, og Førka-bilurin sýgur tangan fullan og koyrir reinska tøð út til bøndurnar.

## Nógv koyring við tøðum

Ætlanin er, at Førka-tangabilurin skal koyra út til allar bøndur í landinum eftir tøðum. Tó verður ikki farið í Sandoynna, fyrr enn undirsjóvartunnilin er komin.

– Tað einasta er, at bilurin skal koyra fullur ella tómur, tí tøðini skulu ikki liggja og skvambla aftur og fram í tanganum.

– Tað dýrasta við einum biogassverkið er koyringin, tí hava vit ein so stóran bil sum gjørligt. Hinir bilarnir, sum kunnu koyra tøð, taka eini 17-18 tons, sigur Fróði Mortensen.

Fleiri bøndur hava í dag køstar, sum taka tað, sum svarar til einar tveir-tríggjar Førka-bilar.

Tøðini, sum bøndurnir fáa aftur, eru avgassað, sum Fróði Mortensen kallar tað. Men samstundis eru tøðini full av køvievni og fosfori, sum er kent frá NPK-tøðum. N er køvievni, P er fosfor, og K er kalium. Súrløgan, sum verður blandað saman við tøðunum,

Framhald á næstu síðu >>



*Stóri framleiðslutangin er 9000 kubikk. Frammanfyri stendur tangin til súrløg, sum av trygdarorsøkum stendur uppi í einum øðrum tanga*

inniheldur nógv køvievni og fosfor, so sambært Fróða Mortensen skuldu tøðini verið góð at fingið aftur.

Harafturat verður eisini svávul eftir, sum blandast upp í tøðini.

– Vit kunnu siga, at vit læna tøðini frá bøndunum, taka gassið burturúr, blanda køvievni og fosfor uppí og lata teimum tað aftur, sigur Fróði Mortensen.

Tøðini, sum bøndurnir fáa aftur, eru næstan so tunn sum vatn og skuldu verið góð at arbeitt við. Meginfelag Búnaðarmanna, MBM, stuðlar bøndurnar at byggja tangar, sum kunnu taka móti tøðunum, sum teir fáa aftur frá biogass-verkinum.

Tilsamans skulu helst vera 13.000 tons av tøðum og súrløgi í øllum tangunum – bæði goymslutangunum og stóru tangunum, sum framleiða gassið.

Tá verkið so fer í gongd er ætlanin, at so hvørt Førka-bilurin fer úr til bøndurnar við tøðum, so skal tangin í móttøkuhøllini fyllast, so verkið alla tíðina hevur síni 13.000 tons.

Og tá verkið er farið í gongd, verða eini 140 tons brúkt um samdøgrið – tað eru 50.000 tons um árið.

Teir størstu bøndurnir hava eini 5000 tons av mykju um árið.

– So er tað uppgávan hjá sjafførunum og bóndum at fáa tað at passa, nær teir skulu fara eftir tøðum hjá teimum ymsu bøndunum. Tað er so ymiskt, hvussu stórar tanga bøndurnir hava, sigur Fróði Mortensen.

## Hita tøðini upp

Inni í móttøkuhøllini lyftir Fróði lokið av tanganum, sum tekur ímóti tøðunum. Tangin er longu fyltur – og so skjótt tann størsti tangin er klárur, verða tøðini pumpað yvir í stóru tangarnar, og pláss verður í móttøkubrunninum, so Førka-bilurin kann fara nýggjan túr.

Ikki fyrr enn hann trýstir lokið á aftur, komi eg at hugsa um, at eg merkti ongan lukt.

– Nei, tað luktar ikki so illa, sum man heldur. Nú hava vit ventilasjónina koyrandi, sigur Fróði Mortensen.

Á veg yvir í framleiðslutangan verða tøðini ella mykjan fyrst reinskað fyri ymiskt órudd – smásteinar og endar – so tað ikki fer so illa við pumpunum.



MYKJA VERÐUR TIL STREYM OG HITA

Eyðkennið er, at rørini tykjast tunn, men pumpurnar hava nógva orku – millum sjey og ellivu kilowatt – tí tankin er at pumpa skjótt, so sandur og annað ikki liggur eftir í rørunum, so tey typpast.

Súrløgur verður blandaður upp í, og síðani verður alt hita upp um 85 stig í 25 minuttir fyri at drepa allar bakteriur.

Løgurin er umleið 42 stig, tá hann verður pumpaður inn í stóru framleiðslutangarnar, har hann skal liggja og framleiða gass. Sjey ferðir um dagin verða nýggj tøð pumpað inn í tangarnar fyri at halda gongd í avgassingini.

Mesta gassframleiðslan fæst burturúr súrløginum, so gassframleiðslan er nær tengd at, hvussu sonevndi biomassin er samansettur, tá hann verður pumpaður inn í framleiðslutangarnar.

Súrløgur er bara eini 40 prosent vatn, og mykjan ella tøðini eru fleiri og hálvfems prosent vatn.

– Besti hitin fyri at fáa gongd á gass-framleiðsluna er 38 stig – sum í maganum á eini kúgv, sigur Fróði Mortensen.

## Tendriproppar

Motorurin er ein Jenbacher gassmotorur. Jenbacher er ein eysturrísk fyritøka, sum er heimsins størsti framleiðari av gassmotorum.

– Ivist í, hvussu nógvir føroyingar kenna Jenbacher, vit eru ikki vanir við gassmotorar. Eg kendi heldur ikki merkið – føroyingar kenna bara til diesel.

Motorurin hevur 20 sylindarar, og at síggja tendriproppar á so stórum motorum er sjáldasamt. Motorurin er 1500 kilowatt.

– Ætlanin er, at alt verkið koyrir 24-7. So kunnu vit ella SEV regulera framleiðsluna, men verkið skal koyra alla tíðina, sigur Fróði Mortensen.

– Tá motorurin koyrir við fullari kraft, so framleiða við 3000 kilowatt av gassi í teimum báðum stóru tangunum.

Av samlaðu framleiðsluni hjá motorinum verða 42 prosent til

*Framhald á næstu síðu >>*



*Motorurin – ein Jenbacher – stendur í húsunun mitt á verkinum*



*Allur biomassin verður hitaður upp um 85 stig í 25 minuttir og so køldur aftur til 42 stig, áðrenn hann verður pumpaður inn í stóra framleiðslutangan*



*Pumpurnar vera allar drivnar við streymi, sum verkið sjálvt framleiðir*



*Norðast á plássinum stendur kyndilin, sum verður brúktur at avbrenna biogass, um framleiðslan verður størri, enn motorurin klárar at slúka*

streym, og umleið 44 prosent verða til hita, og restin er tap – eitt nú tað sum fer upp gjøgnum skorsteinin.

Øll orkan, sum verður brúkt á verkinum, kemur frá verkinum sjálvum.

Kølivatnið frá motorinum verður brúkt at hita tøðini og súrløgin við á veg inn í stóru tangarnar, og avlopshitin fer so til skipanina hjá Fjarhitafelagnum. Sama er við streyminum, har fóðra teir fyrst egnar pumpur og aðra útgerð, so fer restin inn á netið hjá SEV. Skipanin er soleiðis, at um motorurin steðgar, so ber til at fáa hita frá Fjarhitafelagnum.

Brennistøðin á Hjalla framleiðir eisini hita til Fjarhitafelagið, og hitin frá biogassverkinum fer umvegis brennistøðina og kann kølast av har, um yvirskot er av hita til Fjarhitafelagið.

## Gasskyndil

Biogassið frá stóru tangunum verður reinskað og pumpað inn í eina gassgoymslu, sum er 300 kubikk, men tað røkkur bara til ein hálvan tíma. Gassgoymslan er ein stór boya, sum tolir nógv trýst, men ikki flúgvandi takplátur.

– Tí hava vit bygt eina høll, har henda goymsluboya stendur. Hevði hon staðið uttanfyri, kundi hon verið væl størri, men tað var ikki ráðiligt, sigur Fróði Mortensen.

Um motorurin steðgar ella verður noyddur at seta framleiðsluna so mikið nógv niður, at framleiðslan av gassi ikki kann brúkast so hvørt, so kemur kyndilin í brúk.

Norðast á plássinum stendur eitt stórt rør, sum er ein kyndil. Helst skal eldur ikki vera í





kyndlinum, men verður meira gass framleitt, enn motorurin og goymslan kunnu slúka, so verður gassið brent av.

– Helst skal kyndilin ikki brenna ov nógv, tí tað er at lata góða orku fara upp í royk, sigur Fróði Mortensen, og so skemtar hann við, at hann vónar ikki, at teir inni á Bakkafrost á Glyvrum ov ofta síggja royk frá kyndlinum.

Fróði Mortensen sigur, at ein annar fyrimunur við at brenna gassið er, at metanið verður brent og fer í luftina sum $CO^2$. Varð metanið bara latið út í luftina, so var tað nógv verri enn $CO^2$.

– Vit kunnu siga, at vit taka metanið av bønum, har tað annars hevði ligið og fordampað, og brenna tað – fyrst og fremst í motorinum – so tað minkar mundandi um samlaða føroyska $CO^2$-útlátið, sigur Fróði Mortensen.

Og so er tað lukturin.

Um gassið ikki var brent av, men slept út, so hevði tað luktað – luktað illa.

Største ivin hjá grannum og øðrum hevur verið, hvussu verður við lukti. Fróði Mortensen væntar ikki nakað serligt av lukti, tí teir hava eina reinskiskipan, har luftin úr móttøkutangunum fer í gjøgnum.

BIGA-Dan er høvuðsbyggiharri á biogass-anlegginum, Tað er danskt felag, sum hevur bygt nógv anlegg og rekur nógv anlegg.

Fleiri sama slag anlegg sum tað á Sandvíkarhjalla standa aðrastaðni í Evopa. BIGA-Dan hevur sín fasta hátt at byggja biogass-anlegg. Sumt av útgerðini er monterað í bingjum, sum bara vera settar upp við pumpum ella aðrari útgerð í. Nógv útgerð er standard og verður ikki altíð



*Motorurin er ein gassmotorur upp á 1500 kilowatt – og sjálvandi við tendriproppum*

tillagað til nýtsluna hjá verkinum. Eitt nú eru tangarnir til hitaviðgerð 30 kubikk, sum Fróði Mortensen heldur kanska eru eitt sindur „overkill".

## Fellið á Trongisfirði

Av tí at verkið ikki var farið í gongd, tá stóra fellið hjá Bakkafrost var á Trongisvágsfirði, fekk

*Framhald á næstu síðu >>*

Førka ikki loyvi at fylla tangan, sum skal brúkast til súrløg. Tann tangin stendur enn tómur.

– Tangin var klárur, og vit kundu tikið 1000 tons, men fingu ikki tey neyðugu loyvini. Spell, tí tað hevði svarað til næstan 200 tons av olju, sigur Fróði Mortensen.

Súrløgur – í hesum føri av sjálvdeyðum laksi – verður roknað sum sera hættisligur løgur, tí har kunnu til dømis vera sjúkur í, sum kunnu flytast frá einum firði til annan. Súrløgurin skal handfarast við serligum varsemi. Tangin til súrløgin stendur uppi í einum øðrum tanga, tí skuldi tangin skrædna ella farið at leka, so heldur hin tangin løginum, so hann ikki rennur út á økið.

Runt um verkið verður ein høgur garður bygdur, tí skuldi ein tangi skrædna ella farið at likið, so skulu tøðini ikki kunnu renna út í hagan kring verkið.

### Bíða eftir bakterium

Tá verkið er yvirtikið, og gongd skal setast á framleiðsluna, kunnu ganga upp í fleiri mánaðir, áðrenn biologiska prosessin inni í teimum báðu stóru tangunum fer í gongd.

Aðrastaðni hevur tú ofta eitt annað verk, sum tú kanst fáa bakteriurnar frá at seta til, men Fróði Mortensen heldur, at tað hevði verið rættuliga trupult at flutt súrløg til Føroya, so teir ætla bara at bíða til prosessin fer í gongd.

– Vit mugu eisini tryggja okkum, at vit hava ein góðsku á gassinum, sum kann brúkast til motorin. Vanliga verður tað fyrsta $CO^2$, ið avgassast, men so kemur metanið, sigur Fróði Mortensen.








# Sjúrður 20 ár í Maskinmeistarafelagnum

**Sjúrður Heinesen hevur verið skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum í 20 ár. Áðrenn tað hevði hann roynt seg á ymiskum mótum á lívsleiðini, og við í viðføringum hevði hann eisini drúgvar royndir sum aktivur fakfelagsmaður – bæði sum nevndarlimur og sum formaður í øðrum felag**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN - PRESS

1. desember vóru tað 20 ár síðani, at Sjúrður Heinesen tók við sum skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum. Í 2006-2007 var hann í farloyvi í eitt knapt ár, tá hann arbeiddi sum byggimálsviðgeri í Tórshavnar Kommunu, men annars hevur hann røkt starvið sum skrivstovuleiðari øll árini.

Hann trívist væl í Maskinmeistarafelagnum, og tað var heldur ikki ein ferð inn í ókent land, tá hann á sinni søkti og fekk starvið sum skrivstovuleiðari hjá einum fakfelag. Tí hann var sjálvur gamal fakfelagsmaður.



*Sjúrður Heinesen trívist væl í sínum starvi sum skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum og hugsar ikki nógv um, at hann um bara trý ár hevur møguleikan at fara upp á eftirløn*

### Tekniskur assistentur

Sjúrður Heinesen er upprunaliga útbúgvin sum tekniskur assistentur á Tekniska Skúla í Havn í 1976. Áðrenn tað hevði hann tikið studentsprógv í Hoydølum í 1974.

Hann starvaðist síðani sum teknikari, fyrst á Tórshavnar Skipasmiðju í fimm ár og síðani hjá ráðgevandi verkfrøðingarfyritøkuni Brimheim & Leo í 12 ár.

### Ymiskar verkætlanir

Stutta útbúgvingin forðaði ikki Sjúrði Heinesen at loysa ábyrgdarfullar uppgávur.

Á Tórshavnar Skipasmiðju var hann til dømis við til at gera tekniarbeiði til trý ymisk sløg av skipum, línuskipið Váðastein, trolaran Dalenni og ferjuna Ternan. Harafturat var hann við til fleiri umbyggingar av skipum.

– Tað er helst eitt, sum er sermerkt fyri føroysk arbeiðspláss, at tú sleppur at royna teg, um tú hevur hug. Á Tórshavnar Skipasmiðju fóru heilt stórar útbyggingar fram tey árini, eg var har, so tað var á mangan hátt eitt

*Framhald á næstu síðu >>*

*Framhald á næstu síðu >>*

áhugavert og mennandi arbeiðspláss, sigur Sjúrður Heinesen.

Hjá Brimheim & Leo, sum vóru serfrøðingar í HVS (hita, ventilasjón og saniteti) vóru eisini nógvar og áhugaverdar uppgávur at loysa, og Sjúrður Heinesen arbeiddi rættiliga sjálvstøðugt við bæði prosjektering og eftirliti.

Hann minnist, at hann millum annað hevur verið við til at prosjektera og havt eftirlit við HVS -arbeiði í sambandi við bygging av skúlum, barnagørðum, ítróttarhallum, vinnubygningum og íbúðarbygningum.

Arbeitt varð eisini við onkrum smærri útstykkingum við tilhoyrandi vegum, kloakk- og vatnveitingum.

## Formaður

Miðskeiðis í 1980-árunum bleiv Sjúrður Heinesen valdur í nevndina í táverandi Føroya Teknikarafelag, sum var felagið hjá tekniskum assistentum, byggiteknikarum og tekniskum teknarum.

Hann bleiv formaður í Føroya Teknikarafelag og varð verandi formaður í fleiri ár.

So hann visti væl, hvat tað snúið seg um, tá hann tók við starvinum sum skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum.

– Eg kendi spælið, kanst tú siga, og hevði verið í fleiri samráðingum við Lønardeildina, har Súsanna Danielsen, sum seinni bleiv løgtingsstjóri, tá var leiðari. Samráðingarnar gingu fyri seg úti í landsstýrinum, har Atli Dam ráddi fyri borgum tey árini, greiðir Sjúrður Heinesen frá.

## Dugdu snildir

Hóast føroyska samfelagið er nógv broytt síðani miðskeiðis í 1980-árunum, heldur hann ikki, at sjálvar sáttmálasamráðingarnar eru so nógv øðrvísi.

– Eisini tá helt arbeiðsgevaraparturin seg til ein karm, og prinsippini vóru tey somu. Eitt, sum vit kanska høvdu ein ávísan fyrimun av, tað var at vit vóru nokkso snild at fáast við telduskipanir, rokniørk og sovorðið, sum var nýtt tá. Um vit beinleiðis vunnu upp á tað, tori eg ikki at siga, men hesir førleikar gjørdu, at vit ikki vóru so løtt at taka av fótum, sigur Sjúrður Heinesen.

## Felagið klakti formenn

Neyvan vóru tað bara førleikarnir innan ta tá spildurnýggju kt-tøknina, ið kálvføddu nevndina í Føroya Teknikarafelag so væl. Tí hetta felagið vísti seg seinni at vera ein sannur klekingardepil fyri oddvitar í tí størsta fakfelagnum á almenna føroyska arbeiðsmarknaðinum, Starvsmannafelagnum.

Gunnleivur Dalsgarð hevði verið bæði formaður og nevndarlimur í Føroya Teknikarafelag, og




*Lívið er annað enn arbeiði og fakfeløg. Tá ein løta er, er Sjúrður Heinesen skjótur út í fjørðin við tíggjumannafarinum Hvítabjørnin*





Jákup Danielsen var eitt skifti bókhaldari hjá felagnum. Báðir blivu teir seinni formenn í Starvsmannafelagnum. Tað var eftir, at Føroya Teknikarafelag í 1994 var farið upp í Starvsmannafelagið.

Ein triði fyrrverandi nevndarlimur í Føroya Teknikarafelag, Heini Joensen, stillaði eisini einaferð upp til formanssessin í Starvsmannafelagnum. Honum eydnaðist tó ikki at vinna sessin.

– So hvør veit, hevði eg hildið fram í mínum táverandi starvi og verði verandi aktivur fakfelagsmaður, so var eg kanska eisini endaður sum formaður í Starvsmannafelagnum, sigur Sjúrður Heinesen skemtandi.

## Í Sjóvinnufyrisitingina

Stóra kreppan, sum tók seg upp í Føroyum í 1992, gjørdi hinvegin, at hann tvey ár seinni hálsaði um, tí byggivinnan steðgaði fullkomiliga upp, og haldast kundi ikki fram í starvinum hjá Brimheim & Leo.

Men so sá Sjúrður eina lýsing eftir fólki til ta nýstovnaðu Sjóvinnufyrisitingina. Hann søkti og var so heppin at fáa starvið. Hesin stovnur bleiv seinni partur av Skipaeftirlitinum, tá tað bleiv heimtikið sum føroyskt málsøki í 2002. Men hetta var í 1994, og tá vóru bara manningarviðurskiftini undir føroyskum myndugleika. Seinni kom tann tekniski parturin eisini á føroyskar hendur.

Meðan Sjúrður arbeiddi á Sjóvinnufyrisitingini, tók hann eina útbúgving í almennari fyrisiting, sum  handilsskúlin í Havn skipaði fyri.

Hann starvaðist í Sjóvinnufyrisitingini, til hann í 1999 tók við starvinum í Maskinmeistarafelagnum.

So hóast yrkiskósin bleiv broytt miðskeiðis í 1990-árunum, so vardi skilnaðurin frá fakfelagsarbeiðnum bara nøkur fá ár.

Drúgvu royndirnar í fakfelagsarbeiði hava eisini gjørt hann eftirspurdan at røkja álitissessir. Sostatt hevur Sjúrður Heinesen í nógv ár verið verið nevndarlimur í Fasta Gerðarrætti vegna manningarfeløgini og í nøkur ár eisini í Kærunevnd Trygdargrunsins.

## Sjógvurin dregur

Lívið er annað enn arbeiði og fakfelagsrørsla hjá Sjúrði Heinesen.

Pápin var skipsførarin Nikodemus Heinesen, sum í nógv ár var skipari á coastarum, og sum heilt ungur var Sjúrður nakrar túrar við honum.

Men hann hevur eisini roynt seg við fiskiskipi. Hann var sín fyrsta túr til skips við Hólmasundi í 1969, og árið eftir við Eystfelli – tað er núverandi Norðsøki, sum er elsta føroyska træskipið, sum enn er í rakstri.

Seinast í 1980-árunum var hann fýra summur á rað við Syðrabergi til snellufiskiskap undir Íslandi.

Serliga væl dámar Sjúrði Heinesen at flóta, og er veðrið til tað, leggur hann nógv fyri at sleppa út við tíggjumannafarinum, Hvítabjørnin, sum hann eigur saman við einum morbróðuri.

## Á bygd

Pápin var úr Sandavági, har Sjúrður búði til skúlaaldur. Tá fluttu tey til Havnar, tí pápin fór á navigatørskúla. Síðani hevur hann búð í Havn, men frá barni av hevur hann ferðast dúgliga til bæði Sandavágs og til Nólsoyar, haðani mamman, Borgny, var ættað.

– Hugurin at vera í báti stavar heilt vist úr Sandavági og Nólsoy, kanska serliga úr Nólsoy, staðfestir Sjúrður Heinesen.

Eisini gongur hann upp í at vera kropsliga væl fyri. Á yngri árum íðkaði hann judo, men mátti gevast við hesum, tá hann fekk ein skaða. Seinni hevur hann so íðkað fimleik í Havnar Fimleikafelag.

## Familjan

Sjúrður og konan Asbjørg hava trý børn og fimm abbabørn. Sonurin Heðin, sum er elst, og yngsta dótturin, Marjun, búgva við sínum familjum í Danmark, í ávikavist Århus og Havnstrup við Herning. Miðlingadótturin Birna býr við síni familju í kjallaraíbúðini hjá foreldrunum í Hoyvík.

Sjúrður Heinesen er 64 ára gamal, men hugsar ikki stórvegis um, at tað bara eru trý ár, til hann kann lata seg pensjonera.

– Nei, eg havi ongar ítøkiligar ætlanir um at gevast at arbeiða. Eg eri væl fyri kropsliga, tað einasta, sum er farið at bila, eru eyguni. Eg havi altíð verið nærsýntur, og seinastu tíðina eru eyguni versnaði nakað, men um støðan ikki versnar alt ov nógv, klæri eg nøkur ár afturat her, sigur hann.

Hann virkar nú undir sínum fimta formanni í Maskinmeistarafelagnum. Tá hann tók við starvinum 1. desember 1999, var Finnleif Guttesen formaður. Í 2001 var Niels Th. Pedersen formaður eitt stutt skifti, til Jógvan Nybo, sáli, tók við. Í 2007 bleiv Páll Hansen formaður, og sat hann til í mars 2018, tá núverandi formaðurin, Ólavur Gunnarsson, tók við.

# Fakfelagsrørslan stendur í stað

**Tað harmar Sjúrð Heinesen, at fleiri føroysk fakfeløg brúka orku upp á áhugamál, sum onki hava við fakfelagsvirksemi at gera, heldur enn at standa saman og draga eina línu**

TEKSTUR OG MYNDIR: INGOLF S. OLSEN – PRESS

Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum, hevur í nógv harrans ár verið í fremstu røð í føroyskum fakfelagsarbeiði, og var sjálvur í fleiri ár formaður í táverandi Føroya Teknikarafelag.

At kalla alt sítt vaksna lív hevur hann staðið beint hjá og kunna fylgt við gongdini á føroyska arbeiðsmarknaðinum og í fakfelagsrørsluni.

Men hann heldur ikki, at talan hevur verið um stórvegis menning á tí mótinum.

Tvørturímóti. Fakfelagsrørslan stendur í stað, og nøkur feløg brúka orku upp á at røkja áhugamál, sum onki hava við fakfelagsarbeiði at gera, heldur hann.

– Longu tá tá eg sjálvur í 1980-árunum var aktivur í Føroya Teknikarafelag og formaður har, bleiv tað tosað rættiliga nógv um samstarv og at leggja feløg saman. Og tað hevur man tosað um síðani. Onkur smávegis samanlegging hevur verið, og nøkur feløg hava roynt tættari samstarv, men samanumtikið er ov lítið komið burtur úr. Tað haldi eg vera sera harmiligt, sigur Sjúrður Heinesen.



*– Vit hava fakfeløg í Føroyum, sum keypa ella byggja stór hús við tí eina endamáli at leiga tey út. Tey brúka pengarnar hjá limunum at gera vinnuligar íløgur og eru farin inn í útleigingarvinnuna, sigur Sjúrður Heinesen, skrivstovuleiðari í Maskinmeistarafelagnum*

## Ov nógv feløg

Hann undrast á, at tað til dømis skulu vera fleiri feløg við sama slag av limaskara, og nevnir í tí sambandinum arbeiðara- og handverkarafeløg, umframt at tað eisini á øðrum fakøkjum eru fleiri feløg fyri fólk á somu ella líknandi fakøkjum.

– Hetta er trupult at skilja og í øllum førum ikki tekin um samanhald ímillum løntakarar og vilja at draga eina línu, staðfestir Sjúrður Heinesen.

– Tað kostar at reka eitt fakfelag, sum er ført fyri at geva mótpartinum eitt veruligt og kvalifiserað mótspæl í sáttmálasamráðingum og annars at veita limunum nøktandi tænastur. Um smá feløg skulu megna hetta, verður limagjaldið alt ov høgt, heldur hann.

Framhald á næstu síðu >>



*Sjúrður Heinesen dugir at fiska og hevði viljað, at føroysku fakfeløgini stóðu betur saman og eisini dugdu at draga somu línu*

## Vinnurekandi fakfeløg

Eisini heldur heldur hann lítið um, at summi fakfeløg eru so áhugað í at reka vinnuligt virksemi, heldur enn at hugsavna seg um at vinna limunum betri sømdir.

– Vit hava fakfeløg í Føroyum, sum keypa ella byggja stór hús við tí eina endamáli at leiga tey út. Tey brúka pengarnar hjá limunum at gera vinnuligar íløgur og eru farin inn í útleigingarvinnuna. Eg meini so við, tað hevur onki við fakfelagsvirksemi at gera, og tað undrar meg, at limirnir halda, at sovorðið er í lagi, sigur Sjúrður Heinesen.

Maskinmeistarafelagið leigar eisini part av sínum felagshúsi



við Grønlandsvegin í Havn út til Krabbameinsfelagið, men skrivstovuleiðarin sigur, at tað ikki heldur honum aftur at siga sína generellu meingin um føroysku fakfeløgini – heldur ikki, um tað er inni í Maskinmeistarafelagnum.

– Eg haldi tó ikki, at tað stendur so illa til hjá Maskinmeistarafelagnum í so máta, talan er als ikki um nakra stóra leiguinntøku, og bygningurin her var heldur ikki keyptur á sinni við tí fyri eyga at reka leiguvirksemi, sigur Sjúrður Heinesen.

## Sterk saman

Samanumtikið heldur hann, at limapengarnir í føroysku fakfeløgunum vóru betri farnir, um feløgini stóðu saman og til dømis brúktu pengar upp á viðkomandi førleikar hjá leiðslum og starvsfólkum fyri tann vegin at gera feløgini sterkari í samráðingum og betri før fyri at stíga rætt í gerandisdegnum.

Nakrar samanleggingar heldur hann vera upplagdar, eitt nú tá tað snýr seg um somu og nærliggjandi fakøki, har fleiri feløg eru um sama sáttmála.

– Onkrar royndir eru gjørdar at leggja saman ella at gera bindandi samstørv, men tær eru í besta føri endaðar í onkrum jánkasligum samstørvum, sum ikki hava borgað fyri nøkrum stórum framstigum. Tað vísir seg, at egináhugamálini eru so forbankað sterk í Føroyum, eisini í fakfelagshøpi, og tí er tað so trupult at fáa felags stev.

– Sterk samstørv og felags umsitingar kundu skapt eitt umhvørvi á einum hægri fakligum støði og harvið loyst nógv, eisini sjálvt um beinleiðis samanleggingar ikki vórðu framdar. Men vit klára ikki eingongd at gera ein landsfelagsskap fyri fakfeløg í Føroyum, og tað at feløgini standa so spjadd ger, at tey ikki fáa nóg stóra ávirkan í týdningarmiklum málum, sigur Sjúrður Heinesen.

Sum dømi vísir hann á, at fakfeløgini ikki komu upp í part beinanvegin, tá sonevndu hjálparpakkarnar vóru snikkaðir saman í sambandi við koronakreppuna.

– Ólika hugaligt var tað at síggja, hvussu tey duga at samstarva aðrastaðni, til dømis í Danmark, har fakfelagsfelagsskapurin Fagbevægelsens Hovedorganisation var við til at gera eina trípartaavtalu um koronahjálp, sum umfataði meginpartin av danska arbeiðsmarknaðinum. Og tey gjørdu tað upp á 24 tímar, sigur Sjúrður Heinesen.



*– Sterk samstørv og felags umsitingar kundu skapt eitt umhvørvi á einum hægri fakligum støði og harvið loyst nógv, eisini sjálvt um beinleiðis samanleggingar ikki vórðu framdar. Men vit klára ikki eingongd at gera ein landsfelagsskap fyri fakfeløg í Føroyum, sigur Sjúrður Heinesen*





# 11 maskinmeistarar fingu prógv



*Í januar fingu 11 maskinmeistarar prógv á Vinnuháskúlanum. Teir eru Jafet Signar Rasmussen, Jósef Magni Heinesen, Kaj Johannesen, Kjartan Bech, Odd Andreassen, Bjarni Hentze, Gunnar Joensen, Sámal Einarsson, Tóki Hjartarson, Tóki Thorsteinsson og Oddmar Nielsen.*

*Virðislønir: 1. Gunnar Joensen, grindaknív frá SEV. 2. Tóki Thosteinsson, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 3. Jósef Magni Heinesen, kikara frá Norðoya Sparikassa.*

*Ídnisvirðisløn: Jósef Magni Heinesen, lummaur frá Skansi Offshore*

*Mynd: Erland Hentze Rasmussen*





# *FØÐINGARDAGAR Maskinmeistarafelagið:*

| | | | |
|---|---|---|---|
| Jóhannes Hansen | Toftir | 5/5-1950 | 70 ár |
| Anders Nedergaard Hansen | Tórshavn | 23/5-1950 | 70 ár |
| Knút Jóhannus Hansen | Haldórsvík | 2/1-1960 | 60 ár |
| Meinhard Person Jacobsen | Søldarfjørður | 8/1-1960 | 60 ár |
| Sæmund Tausen | Søldarfjørður | 11/1-1960 | 60 ár |
| Jónsvein Joensen | Tórshavn | 20/1-1960 | 60 ár |
| Bogi Jacobsen | Søldarfjørður | 24/1-1960 | 60 ár |
| Jóhan Kallsoy | Vágur | 10/3-1960 | 60 ár |
| Atli Poulsen | Saltangará | 18/5-1960 | 60 ár |
| Regin Alfred Nielsen | Vestmanna | 10/1-1970 | 50 ár |
| Jan Weihe | Skáli | 21/1-1970 | 50 ár |
| Tórstein Joensen | Fuglafjørður | 24/1-1970 | 50 ár |
| Jóannes T. Olsen | Miðvágur | 2/3-1970 | 50 ár |
| Magnus Hansen | Runavík | 13/3-1970 | 50 ár |
| Grímur Vang | Klaksvík | 17/3-1970 | 50 ár |
| Jógvan Hendrik Sigurstein | Tórshavn | 28/4-1970 | 50 ár |
| Steinbjørn Zachariassen | Klaksvík | 28/4-1970 | 50 ár |
| Kaj Anker Joensen | Glyvrar | 23/5-1970 | 50 ár |
| Vilhelm Hansen | Sandavágur | 15/1-1980 | 40 ár |
| Ragnar Justinussen | Tórshavn | 4/2-1980 | 40 ár |
| Tórálvur Poulsen | Tórshavn | 28/3-1980 | 40 ár |
| Esbern Christiansen | Klaksvík | 10/4-1980 | 40 ár |
| Ástmar Sigurjónsson | Sauðárkrókur, Ísland | 11/4-1980 | 40 ár |
| Poul Dan Kjærbo | Tvøroyri | 3/5-1980 | 40 ár |
| Bogi Norðfoss | Tórshavn | 10/5-1980 | 40 ár |
| Áki Ellendersen | Streymnes | 31/5-1980 | 40 ár |
| Jóan Pauli Juul | Toftir | 15/1-1990 | 30 ár |
| Flóvin Váðklett | Klaksvík | 24/1-1990 | 30 ár |
| Rúnar Strøm Debess | Tórshavn | 27/1-1990 | 30 ár |
| Sigurð Mohr | Klaksvík | 24/1-1990 | 30 ár |
| Hallur Berg | Hoyvík | 25/3-1990 | 30 ár |
| Jákup Poulsen Dalsgarð | Argir | 26/3-1990 | 30 ár |
| Olaf Fossdal Guttesen | Tórshavn | 11/4-1990 | 30 ár |
| Búgvi Petersen | Tórshavn | 23/4-1990 | 30 ár |
| Teitur Olsen | Argir | 18/5-1990 | 30 ár |
| Fríði Magnusson Olsen | Rituvík | 28/5-1990 | 30 ár |





# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**2. desember 2019**
Fundur við Manningina á Teistanum. Fundurin varð hildin umborð.

**5. desember 2019**
Hoyring í Vinnunevndini um lógaruppskotið um Sjófeingi. Hoyringin var í Løgtinginum.

**5. desember 2019**
Fundur um sáttmálaviðurskiftini hjá limum okkara, sum sigla hjá Polar Seafood.

**10. desember 2019**
Limafundur á Sundsverkinum

**12. desember 2019**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**20. desember 2019**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru seks mál til støðutakan umframt kunning um átta onnur viðurskifti.

**20. desember 2019**
Hoyring í Fíggjarnevndini um hækking av tilfeingisgjøldunum. Fundurin varð hildin í Løgtinginum.

**21. desember 2020**
Limafundur umborð á Smyrli.

**24. januar 2020**
Prógvhandan á Vinnuháskúlanum, har 11 nýggir maskinmeistarar fingu handað prógv.

**27. januar 2020**
Fundur um sáttmálaviðurskiftini hjá limum okkara, sum sigla hjá Polar Seafood.

**31. januar 2020**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru 12 mál til støðutakan umframt kunning um 9 onnur viðurskifti.

**13. februar 2020**
Arbeiðsfundur í Trygdargrunninum. Fundurin varð hildin á Hotel Føroyum.

**19. februar 2020**
Fundur saman við løgfrøðingi um sáttmálaviðurskiftini hjá limum okkara, sum sigla hjá Polar Seafood.

**20. februar 2020**
Fyrireikandi fundur til sáttmálasamráðingarnar við Føroya Reiðarafelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá FSN.

**24. februar 2020**
Handan av sáttmálakrøvum við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Staðsetingin var á skrivstovuni hjá Maskinmeistarafelagnum.

**25. februar 2020**
Felagsfundur umborð á Teistanum, har Maskinmeistarafelagið, Føroya Skipara- og Navigatørfelag og Starvsmannafelagið viðgjørdu møguligar broytingar í arbeiðsætlanini hjá manningini.

**28. februar 2020**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru fimm mál til støðutakan umframt kunning um fimm onnur mál.

**2. mars 2020**
Kunningarfundur um tryggingar- og eftirlønarviðurskifti í LÍV.

**5. mars 2020**
Handan av sáttmálakrøvum til Fíggjarmálaráðið. Handanin fór fram í Portugálinum í Tinganesi.

**6. mars 2020**
Handan av sáttmálakrøvum til Føroya Reiðarafelag, har umboð fyri Manningarnar vóru stødd. Talan veður um felagssamráðingar, har Manningarfeløgini sostatt koma at samráðast í felag. Handanin av krøvunum fór fram í hølunum hjá Føroya Skipara- og Navigatørfelag.




liv.fo

**Kundin eigur LÍV**

Vinningurin verður borin aftur við góðum tryggingum, lágum rakstrarkostnaði og munagóðum avkasti á pensjónsuppsparingini.